


# PERIFERT VENUKATETUR

## EFTIRANSING OG RØKT AV **PVK**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ

## HVAT ER EITT PVK?

Eitt perifert venukatetur – PVK – er ein bleyt og sera stutt plastslanga, sum fer ígjøgnum húðina inn í eina bláæðr, vanliga í arminum. handarbakinum ella armkreppuni. Gjøgnum katetrið kann gevast heilivágur, væta og blóðúrdráttur. Katetrið er eitt fremmandalikam, og tí er vandi fyri, at bakteriur kunnu troka seg gjøgnum katetrið ella við innstungustaðið í húðini. Tí er týdningarmikið við góðum reinføri og eftiransing af katetrinum.

## PLÁSTUR

Katetrið verður hildið upp á pláss í bláæðrini við einum plástri á húðini yvir innstungustaðnum. Um plástrið fer av, kann katetrið glíða út, og har skal tí beinanvegin setast nýtt plástur á. Plástrið skal altíð skiftast, um tað er leyst og/ella skitið, ella um vatn hevur bloytt tað . Tað er sjúkrarøktarfrøðingurin, sum skiftir plástrið og reinsar húðina rundanum katetrið við sprittserviettum.

## BAÐ

Eitt perifert venukatetur má ikki koyrast undir vatn. Tí skal ein ikki fara í svimjihøllina, í baðikar ella í havið, meðan ein hevur PVK. Tá ein skal brúsa sær, skal plástrið og atgonguportrið (har katetur og infusiónsslanga eru bundin saman) verjast móti vatni við t.d. einum plastposa ella handska. Um gazan ella plástrið verður vátt, skal tað skiftast og reinsast av einum sjúkrarøktarfrøðingi.

## VANDAR VIÐ PERIFERUM VENUKATETRI

Tí at har er vandi fyri infektión, skal ein vera varur við fepur, hjartabankan, um ein gerst illa fyri ella um húðin rundanum innstungustaðið verður reyð, hovin og eym. Um okkurt av hesum kemur fyri, skal ein skjótt seta seg í samband við sjúkrarøktarfrøðingin, sum metir, um talan er um infektión og, um so er, leggur eitt nýtt katetur í staðin.

Um kateturslangan glíður úr, skal ein hyggja eftir, um ein bløðir við innstungustaðið, har katetrið

hevur ligið. Um har bløðir, skal ein trýsta á innstungustaðið við einum reinum pappíri, inntil bløðingin steðgar. Tá bløðingin er steðgað, verður nýtt plástur lagt yvir innstungustaðið.

## HVUSSU LEINGI SKAL KATETRIÐ LIGGJA?

Katetrið kann liggja so leingi tað er í brúk, tað riggar og har ikki eru tekin til infektión.

## UM NAKAR AV FYLGJANDI TRUPULLEIKUM KEMUR FYRI, SKAL EIN BOÐA SJÚKRARØKTAR-FRØÐINGINUM FRÁ.

- Fepur yvir 38,5
- Pínu tá katetrið verður brúkt.
- Tekin uppá infektión, t.d. roði ella vágur.
- Um økið rundanum katetrið er hovið, ella armurin, har katetrið liggur, er vorðin tjykkri.
- Um katetrið er gliðið út.

